Danskernes Historie Online
Danske Slægtsforskeres Bibliotek

## Dette værk er downloadet fra Danskernes Historie Online

**Danskernes Historie Online** er Danmarks største digitaliserings-projekt af litteratur inden for emner som personalhistorie, lokalhistorie og slægtsforskning. Biblioteket hører under den almennyttige forening Danske Slægtsforskere. Vi bevarer vores fælles kulturarv, digitaliserer den og stiller den til rådighed for alle interesserede.

### Støt vores arbejde – Bliv sponsor

Som sponsor i biblioteket opnår du en række fordele. Læs mere om fordele og sponsorat her: https://slaegtsbibliotek.dk/sponsorat

### Ophavsret

Biblioteket indeholder værker både med og uden ophavsret. For værker, som er omfattet af ophavsret, må PDF-filen kun benyttes til personligt brug.

### Links

Slægtsforskernes Bibliotek: https://slaegtsbibliotek.dk
Danske Slægtsforskere: https://slaegt.dk

3

# FØROYA FÓLKA-HÁSKÚLAFELAG

## ÁRBÓK
FYRI 1927

V

TÓRSHAVN - MCMXXVIII
PRENTSMIÐJA FRAMS

Statens pædagogiske Studiesamling
København

# Føroya Fólkaháskúlafelag.

Árbók fyri 1927.

V.

Tórshavn 1928.

## Frá Føroya Fólkaháskúla.

Hetta seinasta árið hevur nógv órógv verið um Føroya Fólkaháskúla. Gølur hava verið um hann bæði í lögtinginum her heima og í ríkisdeginum í Danmørk. Summir av tingflokkunum vilja styðja hann fíggjarliga; tí teir halda hann hava verið og enn vera fólki okkara og landi at miklum gagni. Aðrir royna at taka allan fíggjarligan stuðul undan honum, og teir siga, at hann bert hevur verið til ógagns. Stjórn skúlans kennir seg ikki seka í hesari deilu; heldur ikki kennarar skúlans halda seg hava verið atvold til hennara. Illstøðan hevur røtur sínar í politik, sum einki hevur við uppfostran ella skúlamál at gera. Ivaleyst er tað, at skúlin hevði verið farin í raki, um hann ikki hevði átt so mangar góðar vinir, bæði í Føroyum og øðrum londum, sum hava styðjað hann so væl, at dagliga skúlastarvið ikki hevur notið mein. Hóast viðurskiftini hava verið so trupul, hevur skúlin roynt at halda fram sína vanligu leið. Og hann hevur gjørt meir; hetta seinasta árið hevur hann víðkað starvsøki sítt og hevur haft skúlaskeið í veving. Ætlanin er at halda fram við vevingini í ár eisini, og í komandi árum, um annars einki verður til bága. Her skulu vit greina frá starvi skulans.

# NÆMINGAR FØROYA FÓLKAHÁSKÚLA.

Á summarskúlanum frá 1. mai og til Ólavsøku 1927 vóru hesir næmingarnir:

1. Agnes Sofía Haraldsen, Elduvík.
2. Lena Weihe, Selatrað.
3. Helfred Poulsen, Velbastað.
4. Maria Nicolaisen, Vestmanna.
5. Hanna Tomina Zachariasen, Vestmanna.
6. Sigga Hummeland, Vestmanna.
7. Gullborg á Rógvu, Sandavági.
8. Edith Kamilla Johansen, Sandavági.
9. Jensina Heinesen, Sandavági.
10. Anna Katrina Hansen, Tórshavn.
11. Bergljót av Skarði, Tórshavn.

Á vetrarskúlanum frá 16. oktober 1927 til 15. mars 1928 vóru hesir næmingarnir:

1. Simon Michal G. Zachariasen, Kirkju.
2. Ole Hans P. A. Gaard, Svínoy
3. Niclas Johan Derhard Joensen, Suðrugøtu.
4. Jacob Olivar Guttesen, Bø.
5. Thomas Dam, Argjum.
6. Carl Karbech Mouritsen, Tórshavn.

Á vevingarskeiðinum frá 2. august til 19. september vóru hesir næmingarnir:

1. Katrina Østerø, Trøllanesi.
2. Birgitha Rasmussen, Klakksvík.
3. Olga Jóhannesarson, Funningi.
4. Katrina Olsen, Vestmanna.

5. Johanna Haraldsen, Kvívík.
6. Zaktilda Johannesen, Stykki.
7. Helena Olsen, Nólsoy.
8. Sofía Nielsen, Sandavági.
9. Sofía Joensen, Gásadali.
10. Ada Rasmussen, Tórshavn.
11. Margretha Mouritsen. Tórshavn,
12. Elsa av Skarði, Tórshavn.

Á Føroya Fólkaháskúla hava nú verið 726 næmingar, síðani hann byrjaði starv sítt í 1899, næmingarnir á vevingarskeiðinum ikki uppí roknaðir.

## KENNARAR SKÚLANS.

Umframt R. Rasmussen og Símun av Skarði, ið hava verið kennarar skúlans, síðani hann var stovnaður, hevur skúlin í hesum seinasta árinum eisini haft eykakennarar til hjálpar. Eins og frágreitt er í seinastu árbók hevði skúlin í 1926 nýggja kenslukonu í staðin fyri Sonnu av Skarði, sum hevði givið gentunum lærdóm í hondarbeiði alla tíðina frá 1901. Henda nýggja kenslukonan var Kristjana V. Hannesdóttir frá Stykkishólmi í Íslandi. Ætlanin var at fá hana aftur til okkara í fjør eisini; men tí verri sjúklaðist hon. Brátt kom í ljósmála, at hon hevði feril av tuberklasjúku. Hon var so flutt av Patriksfirði, har hon var kenslukona við barnaskúlan, og á heilsuhølið á Vifilstøðum. Har er hon nú, og hon vónar, at hon fær heilsuna aftur. Í hennara stað kom

so Brynhildur Yngvarsdóttir til okkara í fjør; hon er av Akuroyri. Hon gav so gentunum á summarskúlanum lærdóm í hondarbeiði; eisini var hon kenslukona á vevingarskeiðinum í avgust og september. Vit eru so heppin, at vit hava fingið hana aftur til okkara nú í summar.

Frúgvin Helana Bærentsen var so beinasom, at hon í vetur, eins og vetrarnar frammanundan, gav lærdóm í bókhaldi. Jógvan Christiansen skiparaskúlakennari sýndi skúlanum ta vælvild, at hann gav lærdóm í siglingarfrøði.

Um jóansøkuleitið varð Símun av Skarði so mikið sjúkur, at hann ikki var mentur at halda skúla. Tí kom arbeiðið at liggja dyggari á Rasmusi Rasmussen kennara. Vit fingu eisini aðra hjálp; bæði Hans A. Djurhuus og Jákup av Skarði kennarar góvu lærdóm í lærugreinum Simuns, alla tíðina til skeiðið endaði á ólavsøku. Øllum hesum eykakennarunum veita vit her tøkk fyri hjálpsemi teirra, ið var givin av góðum hjartalag.

## FÍGGJARVIÐURSKIFTI SKÚLANS OG LANDSFELAGIÐ.

Longu tá løgtingið í 1926 noktaði at geva bønarbrævinum um pengastyrk úr ríkiskassanum viðmæli sítt, fingu vit illgruna um, at einki mundi fara at koma haðani, og stjórn skúlans hevði tí fund 5. november 1926 til at samráðast um, hvat gjørt átti at vera til at bjarga skúlanum, um einki kom úr ríkiskassa. Millum annað var samtykt á tí fundinum at samráðast við

stjórn Føroya Fólkaháskúlafelags um fíggjar=viðurskifti skúlans. 16. januar, tá ið frætt var, at Byskov skúlamálaráðharri ikki vildi fremja søkina um styrk til skúlan, hevði so stjórn skúlans fund saman við stjórn felagsins, og har var avgjørt, at innboðið skuldi verða til almennan fund, so at vinir og vælvildar=menn skúlans har kundu samráðast um, hvat best var at gera. Um søgu landsfelagsins og stovnan tess er sagt frá í øðrum stað í hes=ari árbók.

Tveir av mætastu vinum, ið skúlin eigur utanfyri Føroyar, Tormod Jørgensen skúlastjóri í Danmørk og Torleiv Hannaas professari í Norra, og sum báðir fluttu tiltiknar røður á ólavsøkuaftansfundinum, bóru skúlanum høvd=ingaligar gávur; Tormod gav honum 910 krón=ur frá vínum í Danmørk og Torleiv 1600 krónur frá vinum í Norra. Skúlans vegna veita vit teimum her bestu tøkk okkara.

## FUNDIR.

Fundir hava ofta verið á skúlanum. Fyrst er at nevna hin almenna fundin um stovnan Landsfelagsins.

Eisini hava verðið mangir fundir her saman við felagnum Merkinum og næmingum kenn=araskúlans. Á hesum fundum hava flutt røður ella lisið upp skaldaverk *Hans A. Djurhuus, Chr. Holm=Isaksen, H. M. Jacobsen, M. A. Jacobsen, J. Dahl* og kennarar skúlans.

## ELSA JOHANNA RASMUSSEN.

15. juni andaðist Elsa Johanna Rasmussen, dóttir Onnu Sofíu og Rasmusar kennara Rasmussens. Henni vantaði bert ein dag í tey fullu 17 árini. Hon var, ta stokkutu tíð hon livdi, eitt frálíka gott barn. Hon gekk í realskúlan, og ætlanin var, at hon skuldi taka millumskúlaprógv; men so sjúklaðist hon og fekk langa songarlegu. Tolin og sálarsterk bar hon sjúkuna at deyðastund sínari. Sjálvandi kendu faðir hennara og móðir sorgina meinasta; men øll, sum standa teimum og skúlanum her nær, tóku lut í sorgini og kendu saknið. Øll hava bert góð minni um hana.

Símun av Skarði

## LANDSFELAG FØROYA FÓLKAHÁSKÚLA

Tá ið Føroya løgting á summri 1926 ikki vildi mæla ríkisstýrinum til at veita Føroya Fólkaháskúla statsstudnað, kom einasti fólkaháskúli her á landi til at standa á veikum føti, og vinir háskúlans vóru á einum máli um, at nú mátti gerast nakað munagott, um skúlin skuldi bjargast.

Hin 20. mars 1927 komu saman á Føroya Fólkaháskúla menn og kvinnur, sum untu skúlanum væl, og tey komu har á samt um at stovna Landsfelag Føroya Fólkaháskúla. Hin 18. apríl helt felagið aðalfund á háskúlanum, har

lógirnar vórðu samtyktar, og hesir vórðu valdir inn í nevnd felagsins:

B. A. Samuelsen, Just Jacobsen, A. Ziska, Louis Zachariasen og N. A. Eidesgaard
við tiltaksmonnunum: J. Lambaa og Cl. Dalsgaard.

Nevndin gav seg brátt í holt við at savna saman pening við gávum, og í Tórshavn komu við fyrstu atlögu inn *1280 kr.* Frá bygdunum kom peningurin ikki so brátt inn, men tað er öll grund til at gleða seg yvir, at fólk í slíkum vána tíðum, sum nú hava verið, tó eru fús til at veita háskúlanum peningaligan stuðul. Umframt tað, sum er sent beinleiðis til háskúlans, eru nú hetta lidna roknskaparárið innkomnar gjögnum landsfelagið *2540 kr.*, og vónandi fær felagið eitt sindur av peningi afturat til hetta roknskaparárið.

Nærri frágreiðing frá landsfelaginum kemur fram í næstu árbók; men eg skal her loyva mær at takka öllum, sum higartil hava styðjað okkum, og minna fólk á, at tað at styðja landsfelagið, tað er tað sama sum at styðja háskúlan sjálvan.

Louis Zachariasen.

## FØROYA FÓLKAHÁSKÚLAFELAG

Um hvussu illa hin danska lógin um fólkaháskúlar og búnaðarskúlar hóskar fyri viðurskiftini her á landi varð gjølla frágreitt í árbókini í 1926. Hetta at lógin í royndum er ónýtilig hjá Føroyingum, er atvold til so ringan stand, at verður ikki umskift á ein ella annan

hátt, so verður Föroya Fólkaháskúli at verða afturlatin.

Frá danska statinum fekkst í 1927 eingin studningur. Eftir standa nú bert tey rættindi, at næmingar, tá teir senda bønarbræv til Føroya amt, kunnu fáa peningastyrk. Frá Föroya lögtingi fekk skúlin ein lítlan studning og síðani tekur háskúlafelagið tøk, sum tað er ment.

Og skúlin hevði óivað nú staðið stongdur, um ikki hugaðar kvinnur og hugaðir menn tóku seg saman og stovnaðu eitt landsfelag. Hetta felagið savnaði stóran pening saman, sum givin varð til skúlan. Men tað vóru ikki einans Føroyingar, ið vóru sinnaðir at bjarga skúlanum. Í Danmørk setti háskúlastjóri Tormod Jørgensen saman við øðrum góðum monnum seg á odda og savnaði pening saman, og í Noregi útinti professari Hannaas tað sama. Hesin eykapeningastyrkur, borin saman av hugagóðum fólki bæði innan og uttanlanda, hevur bjargað skúlanum so frætt, at hann er mentur at halda áfram við starvi sínum.

Her má bæði skjótt og brátt verða umskift og onnur leið verða løgd. Her má í fyrstu atlögu Føroya løgting taka sær um reiggj og vika sær í ta leið, ið sýna kann mentan og menning, og í hesum sum í øðrum málum gera tað, at vit kunna koma at verða taldir við millum hitt fólkið av norrønu ættini.

— — — — —

Ólavsökuaftan 1927 varð aðalfundur settur á Føroya Fólkaháskúla. Hetta var ein sermerktur fundur. Fyrst av teirri atvold, at so nógv av okkara grannalondum áttu fólk á fundi so

háttað, at hin norðurlendska tungan var at hoyra eystan úr Sviaríki til Íslands. Tínæst at hesir, bestu vinir skúlans, umframt tey góðu orð og tær blíðu heilsanir, teir bóru fram, eisini komu við stórari peningagávu til skúlans.

Har vóru röður*) hildnar av Jørgen Fr. Jacobsen, professara Hannaas úr Noregi, há=skúlastjóra Tormod Jörgensen úr Danmørk, Símuni av Skarði og Rasmusi Rasmussen. Til=steðar á fundi vóru eisini dr. Ek úr Sviaríki og Brynhildur Ingvardsdóttur úr Íslandi. Sera for=kunnugt og athugavert var at hoyra professara Hannaas flyta fram sína røðu á góðum föroysk=um máli.

Aftaná allar røður kvað fundarfólkið hin norska, danska, svenska, íslendska og föroyska tjóðskaparsangin.

Formaðurin greiddi frá felagsyrkinum. Gran=skoðaður roknskapur varð havdur frammi og samtyktur.

## Nevndarval.

Til stjórnarmenn vóru einmælt kosnir: Nyholm Debess, Tórshavn, formaður, J. P. Andreasen, Tórshavn, næstformaður og M. A. Jacobsen, Tórshavn, roknskaparmaður.

Til stjórnartiltaksmenn vóru aftur=valdur: Chr. B. Jacobsen og J. P. Gregersen, Syðrugötu.

Til roknskapargranskarar vóru sama=leiðis afturvaldir: B. A. Samuelsen og Richard Long, Tórshavn.

---

*) Røðurnar eru prentaðar í »Tingakrossi«.

# ROKNSKAPARYVIRLIT

1926–27.

## T ø k u r.

| | kr. | oyr. | kr. | oyr. |
|---|---|---|---|---|
| Í varðveitslu frá undanfarnum ári ... | | | 474 | 95 |
| Limagjald 1926–27 ...... | 785 | 10 | | |
| Limagjald til landsfelagið . | 163 | 50 | | |
| Rentur ............. ... | 9 | 51 | | |
| | | | 958 | 11 |
| | | | 1433 | 06 |

## G j ø l d.

| | kr. | oyr. | kr. | oyr. |
|---|---|---|---|---|
| Næmingastyrkur ............... .. | | | 715 | 00 |
| Løn til eykalærara .... .. ......... | | | 50 | 00 |
| Árbók 1926 ..................... | | | 155 | 00 |
| Lýsingar, pappír o. a. .......... ... | | | 75 | 21 |
| Goldið landsfelagnum ............ | | | 163 | 50 |
| Í bankanum og hjá roknskaparmanninum ...... | 144 | 35 | | |
| Lán til háskúlans ........ | 130 | 00 | | |
| | | | 274 | 35 |
| | | | 1433 | 06 |

# Limir Føroya Fólkaháskúlafelags 1927—28.

**Umboðsmenninir eru merktir við *.**

Bøur:

Guttesen, Jacob O.
Guttesen, Gutte.
Heinesen, Erling.
Jacobsen, O. J.
Jacobsen, Sunneva.
Joensen, Elias.
Joensen, J. H. G. *
Ryggi, Mikkjal á.
Zachariasen, O. J.

Eiði:

Mørkøre, Ingibjørg.
Mørkøre, Johs.
Mørkøre, Niels.
Olsen, Poul. *
Olsen, Anna.
Rasmussen, R. K.
Simonsen, Valborg.

Elduvík:

Eldevig, Frederik. *
Haraldsen, Kristian.
Haraldsen, Agnes.
Joensen, J. Gaard.

Fuglafjørður:

Reynberg, E. A.

Fugloy:

Hansen, O. G.
Jacobsen H. M.
Kristiansen, Óluva.
Matras, Karolina. *
Zachariasen, Sigrið.
Zachariasen, S. M.

Funningur:

Berg, Martin.
Dahl, Peter.
Eide, Maria. *
Jacobsen, Jacob.
Jóhannesarson, Jákup.
Petersen, Poul P.

Gásadalur:

Henriksen, Johs.
Jensen, Hans N.
Joensen, Anna E.
Joensen, Jacobina.
Joensen, Johs.
Joensen, Kristina S.
Petersen, Peter.

Gjógv:

Debess, Sofus.
Joensen, Johanna M.
Joensen, Peter Pauli.
Joensen, Sanna.
Klein, Daniel.
Klein, Johanna.
Klein, Olaf K.
Kallsoy, Johan. *
Kallsoy, Kristianna.

Glyvrar:

Bjarnadal, Kristian. *
Jacobsen, Meinhardt.

Gøta;

Gregersen, J. E.
Gregersen, J. P.
Gregersen, Sofia J.
Hansen, Hans E.
Hansen, Jacob.
Hús, Jógvan við
Húsgarð, Elias. *
Húsgarð, Maria.
Jacobsen, Chr. B.
Konoy, S. P. úr
Poulsen, Andreas.
Poulsen, P. Chr.
Simonsen, Jacob.
Simonsen, Johs.
Thomsen, Else.
Thomsen, Anna K.
Thomsen, Magdalene
Thomsen, T. J.

Heiðarnar:

Danielsen, Sofie.
Simonsen, Emma.

Hestur:

Joensen, Herdis.
Johannesen, Johs.
Klementsen, Malvina.
Poulsen, Elisabeth.
Zachariasen, Juliane. *

Hov:

Hovgaard, Niclas.
Midjord, Sofus M. *

Hoyvík:

Dalsgaard, Johs.
Hoydal, Dánjal.
Mohr, Olaf.

Húsar:

Højgaard, Malan. *

Húsavík:

Danielsen, Anna M.
Jógvansson, Dion.
Johannesen, Clement.
Magnussen, Anna K.S.
Magnussen, Dorthea.
Magnussen, Magnus.*
Magnussen, Sunneva
Sørensen, Jens.
Sørensen, Susanne K.

Hvalbøur:

Holm, Elisabeth.
Næs, Martin.
Næs, Peter Olaf.

Hvalvík:

Joensen, Hanna.
Joensen, Johs.

Hvítanes:

Olsen, Susanna.

Kaldbak:

Wang, Poul.

Kirkjuböur:

Patursson, Bergliot.
Patursson, Sjúrður.
Samuelsen, Karen *

Klakksvík:

Biskupsstøð, Hans.
Enniberg, A. *
Enniberg, Sofia K.
Hansen, Daniella F.
Hansen, S. F.
Jacobsen, Hanna W.
Jacobsen, Magnisa
Jensen, Hans.
Joensen, Jacobina.
Joensen, Joen.
Joensen, Kathrina M.
Joensen, Kristoffer.
Johannesen, Anna.
Justesen, M. P.
Justesen, Rakkel.
Klakstein, Elsebeth T.
Klakstein, J. P.
Lützen, A. C.
Petersen, Else B.
Petersen, Frida.
Rasmussen, Johan.
Skarði, Elsa av
Vágsheyg, Andrea.
Waag, Einar.
Waag, Hans.
Winther, Mourits.
Winther, Theodora,
Zachariasen, S. P.

Kollafjørður:

Dam, Johs.
Debess, Sigga M.
Djurhuus, J.C. (Heyggi)
Djurhuus, J. C. (Ting-garði). *
Djurhuus, Karolina.
Djurhuus, K. (Heyggi)
Djurhuus, Nelly (Heyggi).
Djurhuus, W.(Heyggi)
Hansen, Chr. A. F.
Joensen, Johs. E.
Johansen, Hans.
Olsen, Anna K.

Kunoy:

Heinesen, Jacob.
Jacobsen, Sofie M.
Joensen, Anna K.
Kunoy, Steffan.
Olsen, J. S. *
Poulsen, Daniel.
Poulsen, Sigga M.
Seyðberg, Andreas.
Sørensen, Esberg.

Kvívík:

Danielsen, Kristian K.
Davidsen, Jacob.
Haraldsen, Johanna.
Iversen, Sofie.
Jacobsen, Ellen S.
Jacobsen, Jacob.
Jacobsen, Johanna.
Jacobsen, Ole.
Jensen, Joen.
Jensen, Kristian. *
Jensen, O. J.
Jensen, Zachthilda.
Madsen, Gregorius.
Madsen, H. V.
Madsen, Samulina.

Lorvík:

Hansen, Malena.
Hansen, Martinus C.
Joensen, Andreas.
Joensen, Jona F.
Joensen, Thorvald.
Kristiansen, Kristiane.
Lervig, Sylverius A.
Olsen, Ole. *
Olsen, Páll Nólsoy.

Leynar:

Hansen, Maria.
Hansen, Vilhelmina. *
Hansen, Th. P.
Joensen, Joen.

Miðvágur:

Haraldsen, Heine.
Joensen, J. H.
Niclasen, D. P.
Niclasen, Louisa A.

Rasmussen, Harald.*
Rasmussen, Martina S.
Vang, Jens J.

### Mykines:

Hansen, Johanna M.
Joensen, Kr. *
Petersen, Poul.

### Mikladalur:

Johannesen, Marius.
Mørkøre, Anna E.
Olsen, Johanna M. Ø.
Olsen, Ole.
Olsen, P. J.
Poulsen, Johanna M.
Poulsen, Joen P.
Sørensen, Johanna C.
Sørensen, J. A.*

### Nólsoy:

Hansen, Hans M.
Hansen, Jens
Joensen, Joen
Nielsen, H. P.
Simonsen, S.*

### Norðradalur:

Reinert, Nordina
Reinert, Thomas*

### Norðskáli:

Petersen, Axel

### Oyndarfjørður:

Eidesgaard, Anna*
Eidesgaard, H. M.

### Saksun:

Hansen, Anna S.
Magnussen, Anna M.

### Sandavágur:

Heinesen, Edvard
Heinesen, Jensina
Heinesen, Maria
Heinesen, Zacharias
Hentze, Edvin
Hentze, Emil
Jákupsson, Eirikur
Joensen, Jens Pauli
Joensen, Poul*
Johansen, Edith
Nielsen, Hjalmar
Petersen, Emil
Petersen, Heine
Rógvi, Guldborg á
Simonsen, Hentze P.
Simonsen, Joen J.

### Sandur:

Djurhuus, Kristina
Djurhuus, Sigvald*
Hentze, Anna M.

Zachariasen, Louis
Ziska, A.

Tröllanes:

Joensen, Anna S.
Joensen, Johanna M.
Volles, Johan

Tvøroyri:

Baia, Jacob
Dam, Jens
Dam, P. M.*
Dimon, Sofus
Enni, D. J.
Gregersen, Th.
Hentze, P.
Joensen, Thorvald
Mortensen, Elieser
Mortensen, Johan
Nolsøe, J. (L.)
Nolsøe, J. (P.)
Olsen, Jacob
Poulsen, Edith
Poulsen, Olaus
Strøm, T. M.
Vestergaard, Elsebeth
Øster, Poul

Vágur:

Dahl-Olsen, G.*
Hansen, H. P.
Hjelm, J. A.
Hjelm, Sanna K.
Joensen, Elsebeth
Johannesen, Samuel
Magnussen, H. P.
Mortensen, Sunneva
Nolsøe, Peter
Petersen, Elieser

Velbastaður:

Dalsgaard, Johs.
Dalsgaard, Sofía
Danielsen, Johs.
Danielsen, Marie
Danielsen, Else
Frýðdal, Maren K.
Pállsson, Johs.
Pállsson, Niels P.
Pállson, Hans
Pállsson, Páll D.*
Pállsson, Vilmund S.
Poulsen, Helfred
Simonsen, A. E.

Vestmanna:

Didriksen, O. J.
Djurhuus, J. O. F.
Guttesen, Johs.
Hansen, Jacob P. S.
Hansen, Poul
Haraldsen, D. A.
Heygum, Brynhild á
Heygum, Hjalgrimur á
Heygum, Petur á
Hummeland, Sigga

Jacobsen, Borga
Jacobsen, Otto
Johannesen, H. P.
Johannesen, K. E.
Johannesen, Poul
Klein, Edmund
Kristoffersen, O. J.*
Nicolajsen, Johs.
Nicolajsen, Maria
Olsen, Oliver
Thomsen, T. G.
Waag, Hj.
Zachariasen, Hanna
Zachariasen, J. P.

Viðareiði:

Hansen, Poul E.*
Pálsdottir, Ásla
Sørensen, J. A.

---

Keypmannahavn:

Olsen, Sigga, Under Elmene 10.
Olsen, Trond, Under Elmene 10.

# Tøkk.

EG skal her bera fram tøkk mína til Lands-felagið fyri tann peningastyrkin, sum tað beyð mær, tá mær seinasta summar var so mikil tørv á at fáa góða hvíld. Aldri havi eg haft betri frítíð enn tær sjey vikurnar, eg og kona mín dvøldust í skotska hálendinum. »Gáva er, ið til gagns kemur«, sigur fornt orðtak, og sjaldan man tað hava hóskað betur enn upp á ta gávuna, ið mær varð veitt.

Símun av Skarði.

# INNIHALD.


| | bls. |
|---|---|
| Frá Føroya Fólkaháskúla | 3 |
| Næmingar | 4 |
| Kennarar | 5 |
| Fíggjarviðurskifti | 6 |
| Fundir | 7 |
| Elsa Johanna Rasmussen | 8 |
| Landsfelagið | 8 |
| Háskúlafelagið | 9 |
| Nevnd | 11 |
| Roknskapur | 12 |
| Limalisti | 13 |
| Tøkk | 22 |

## *Føroya Fólkaháskúlafelag*

*heldur aðalfund ólavsøkuaftan kl. 6 s. p.. á háskúlanum.*

*Røður verða fluttar.*

*Dagsskrá:*

1. *Frágreiðing um felagsyrkið.*
2. *Roknskapurin.*
3. *Nevndarval.*
4. *Ymist.*

*Nevndin..*

# FØROYA FÓLKAHÁSKÚLI

*VETRARSKEIÐ fyri dreingir er frá 16. oktober til 15. mars.*

*SUMMARSKEIÐ fyri gentur er frá 1. mai til 28. Juli.*

*VEVINGARSKEIÐ í august og september.*

*LÆRUGREINIRNAR eru hesar: Føroyskt, danskt, rokning, skriving, söga, landafröði, náttúrufröði, samfundslæra og songur. Haraftrat á vetri: Siglingarfrøði, bókhald og tekning, — og á summri: Hondarbeið.*

*KOSTNAÐURIN: Dreingirnir lata hvør 77 kr. um mánaðin (fyri innivist, kost, undirvísing og ljós), og peningurin verður goldin á henda hátt: Fyri 1. mánaðin 87 kr., 2. mánaðin 82 kr., 3. mánaðin 77 kr., 4. mánaðin 72 kr. og 5. mánaðin 67 kr.*

*Genturnar lata hvør 75 kr. um mánaðin á henda hátt: 1. mánaðin 80 kr., 2. mánaðin 75 kr. og 3. mánaðin 70 kr.*

*STUDNINGUR TIL NÆMINGA: I. Studningur er at fáa hjá amtinum, og bønarbrævið eigur at verða skrivað á skema, ið er at fáa hjá kommunustýrinum. Til má verða skilað í bønarbrævinum, at ætlanin er at fara á Föroya Fólkaháskúla. Bönarbræv um studning til summarskeið skal verða sent amtinum innan 15. mars, til vetrarskeið innan 15. august.*

*II. Eisini Føroya Fölkaháskúlafelag hevur eitt sindur av peningi at veita til studna; bönarbræv kann verða sent til Föroya Fólkaháskúla.*